# Fyrsta føroyska symfoniin

*Fríggjakvøldið verður Oceanic Days framførd. Tað verður Íslendska Symfoniorkestrið, ið leikar fyrstu føroysku symfoniina. Eykakonsert verður leygardagin*

Dagfinn Olsen

Stórur áhugi er, nú Sunleif Rasmussen hevur skrivað sína fyrstu symfoni. Hetta er samstundis fyrsta føroyska symfoniin, ið nevnist Symfoni nr 1 - Oceanic Days.

Sunleif hevur leitað sær íblástur í føroyskum umhvørvið og føroyskum mentanararvi. Havið og lívið í havinum hava leiklut. Eisini hevur gamli føroyski tónleikurin, ella sangurin, leiklut, tí tónasmiðurin hevur leitað aftur til kvæðini og sálmarnar. Soleiðis liggja eitt kvæðalag og eitt sálmalag, sum fjaldir hornasteinar undir symfoniini.

Sunleif greiðir frá: Tónleikur er ljóð, sum ferðast í tíð. Við hesi symfoni havi eg roynt at lagt eina rúmdimensión afturat tónleikinum. Heta havi eg gjørt við at seta tveir percussionistar og hátalararnar til annan synthesizaran aftan fyri áhoyrararnar. Sostatt verða áhoyrararnir umgyrdir av tónleiki. Har afturi í salinum virkar tónleikurin fyri tað mesta sum eitt ekkó av tí, sum fyriferst á pallinum. Eg havi roynt at instrumentera soleiðis, at tónleikurin alla tíðina flytir seg í orkestrinum millum orkestrið og tónleikararnar aftan fyri áhoyrararnar.

Í kompositiónsprosessini er melodiurin í sentrum. Í byrjanini av symfoniini hoyrist nakað ógvuliga sentralt í mínum tónleiki. Út frá einum melodii í klarinettini verður tað, sum eg kalli skuggaharmonikkur, sett í gongd. Síðani kemur ein melodiur í aðruviolinunum, sum fær træblásararnar at fara upp og niður eftir tónastiganum. Ella seinni í fyrsta satsi har ein klarinettsolo setir glissandi ígongd o.s.fr.

Tann lítli tónastigin, sum vibrafonin og klokkuspælið hava í byrjanini av symfoniini, er eitt slag av ritornell, sum kemur aftur í øllum trimum satsunum í ymiskum variantum. Fyrsti satsur er ógvuliga organiskt uppbygdur. Hann aldar aftur og fram millum kamarmusikalskar passasjur og orkesturpassasjur. Her hava ein klarinettsolo, tvær soloviolinir og ein solotrompet stóran leiklut.

Annar satsur, sum verður spældur attacca, byrjar ógvuliga stillisliga. Men sum frá líður verður tónleikurin alt meira lívligur til hann at enda gerast ógvisligur. Við øðrum orðum formar satsurin seg eins og ein alda sum reisist frá dýpinum og upp har til, at hon er um at bróta. Í byrjanini av øðrum satsi hava ein solocello og ein solofagott ein týðandi leiklut.

Í fyrsta parti av triðja satsi var tað ógvuliga umráðandi hjá mær við tónleiki at royna at lýsa heimsins elsta og mest monumentala andadrátt, nevniliga havsins andadrátt. Fyrst ein harmoniskur andadráttur millum teir ymisku strúkararnar og teir báðar synthesizararnar við smáum innsløgum av blásarum í hækkandi tónum. Hetta breiðir seg út til ein størri part av orkestrinum, meðan tey soloinstrument, sum higartil hava verið presenterað, spæla ein resiterandi melodi, spjaddan út yvir tríggjar oktavar. Eftir hetta stendur alt orkestrið og andar í einum stórum harmoniskum spektri, fylgt av einum stórum klokkuklangi bæði framman og aftan fyri áhoyrararnar. Meðan hesar rørklokkur ringja av fullari megi, tónar ein stillur melodiur fram. Hesin melodiur verður spældur og sungin samstundis í ymiskum tempi av violinum og bratsjum. Eftir hetta introduseri eg tað seinasta soloinstrumentið – tubuna. Hendan risan millum messingblásarar lati eg upptraðka eins og bláhval, sum spælir sær í sólskygdum bylgjum. Triði satsur hevur stórt sæð sama bygnað sum annar satsur: Ein risastór alda, ið reisist upp úr ongum. Eftir tað síðsta stóra orkesturklimaksið siga teir sjey solistarnir: klarinett, trompet, tvær violinir, fagott, cello og tuba stillisliga farvæl.

## Sigrun í Listaskálanum

*Framsýningin letur upp leygardagin 1. apríl kl. 16.00. Tórshavnar Kamarkór syngur*

Sigrun Gunnarsdóttir Niclasen er fødd 1950 á Eiði.

Útbúgving: Tekniskúli hjá Askou Jensen á Glyptotekinum í Keypmannahavn 1971–72, Málara- og grafikkskúlin á kunstakademinum í Keypmannahavn (Vilhelm Freddie, Dan Sterup Hansen, Freddie A. Lerche og Sven Dalsgaard) 1973–80.

Síðan miðskeiðis í 1970-árunum hevur Sigrun sýnt fram á Eiði og í Havn, m.a. á Ólavsøkuframsýningini 1975–98 og Várframsýningini 1992–99 hevur givið stóran listarligan íblástur, og í fjør hevði hon serframsýningar í Tasiilaq, Grønlandi, á Eiði og í Havn.

Hetta er fyrsta stóra serframsýning Sigrunar í Listaskálanum.

Framsýningin er opin til 24. apríl 2000. Týsdag-fríggjadag kl. 14–17. Leygardag-sunnudag kl. 14–18. Mánadag er ikki opið. Páskadag er framsýningin ikki opin.

## Báran eydnuhjól

Í samband við at Báran skipar fyri stórum eydnuhjóli norðuri á Fossánesi nú leygarkvøldið frá kl. 20, verður nógv gott at vinna, eitt nú Playstation, lomb, stereoanlegg, før. kjøt, fartelefonir og jau, jau ferðir frá Atlantic Airways til Íslands.

Í samband við tiltaki verður eisini ein lutaseðil seldur, ið kostar einans 5 kr, á lutaseðlinum verður 10 vinningar, harav verður eitt lamb, og ein jau, jau ferð frá Atlantic Airways til Íslands, seðilin verður drigin, tá eydnuhjólið endar leygarkvøldið kl. 24.00. Nevndin í Báruni hevur samtykt, at partur av yvirskotinum skal fara til børnini í Ukraina sum koma til Føroyar á vitjan í summar, nevndin heldur at hetta er eitt gott tiltak, sum nakrir føroyingar gera fyri hesi børn og hevur tí samtykt at stuðla teimum.



# Mótmæltu á Falkavegi og í Tinganesi

*Í gjár gjørdu næmingar úr framhaldsdeildum aftur vart við sína ónøgd, nú sáttmálasettu lærararnir hava verið raktir av arbeiðssteðgi í nærum 3 vikur*



*Í gjár blokeraðu næmingar deildina hjá Undirvísingar- og Mentamálastýrinum við Falkaveg í Havn. Eisini høvdu næmingarnir verið í Tinganesi árla á morgni. Tá Finnbogi Arge kom til arbeiðis, møtti honum skelti, ið boðaði frá, at frí gevur 03*

- do -

**Myndir: Jens Kristian Vang**

# Kann taka tíð við frumatkvøðu

*Tá Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið finna semju, skal semjan til frumatkvøðu millum allar limir felagsins. Hetta kann taka eina viku*

Dagfinn Olsen

Eftir at samráðingarnar millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið slitnaðu á kvøldið tann 7. mars, hevur samband ikki verið millum partarnar.

Hesa vikuna hava semingsmenninir Allan Skaalum og Rúni Heinesen tó aftur roynt seg.

**Ikki heilt rætt**

Tað fræum í gjár, at Føroya Lærarafelag segði seg vera til reiðar at fara aftur til samráðingarborðið.

Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Lærarafelagnum, segði seinnapartin í gjár, at hetta er ikki heilt rætt.

– Vit hava sagt ja til, at semingsmenninir koma við einum samráðingaruppleggi, sigur Elsa Birgita Petersen, sum væntaði at hoyra nærri frá semingsmonnunum í dag.

**Frumatkvøða**

Fæst semja millum partarnar, so kann ganga nakað av tíð, áðrenn lærarar aftur fara til verka. Ein semja skal til frumatkvøðu millum limir Føroya Lærarafelags.

– Alt fer til frumatkvøðu millum limirnar. Vit hava gjørt alt klárt, men tað tekur tíð, tí tað skal út um alt landið. Ein vika gongur við tí, sigur Elsa Birgitta Petersen





*Tóra F. Nolsøe úr Dali er í starvsvenjing á Politistøðini í Havn*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Í starvsvenjing hjá løgregluni

Sólrun H. Olsen
Í starvsvenjing á Sosialinum

Hvør er tú?
Tóra Frígerð Nolsøe, 16 ár, Dalur.

Hví valdi tú Løgreglustøðina?

Eg havið hugsað um eina útbúgving sum løgreglukvinna, so at eg fái innilit í, hvat man kann vænta sær í framtíðini.

Eftir at hava verið har nakrar dagar, heldur tú at hetta er eitt starv fyri teg?

Ja. Spenningur og gátur hevur mín størsta áhuga.

Hvat krevst av einum persóni til hetta arbeiðið?

Hann skal hava sterka psyku, halda høvdið kalt, gott tol, í sera góðari venjing, hjálparsamur, tí hetta er seinasti skansi hjá fólki, tey koma ikki altíð fyrst til ein løgreglumann/kvinnu at biðja um hjálp.

Hvussu er umhvørvið har?

Tað er sera gótt, øll halda saman.

Er hetta nakað tú vil mæla øðrum til at royna?

Ja, tað haldi eg. Tey skulu bara verða klár yvir, at myndin man hevur sett sær er als ikki tann sama, ið ein hevði væntað.

Hvat heldur tú um tíðarskeiðið tú er í starvsvenjing (tvær vikur)?

Kanska ov stutt, nei eg veit ikki, tað er nokk passaligt. Tað er ongantíð, at tú sleppur at royna alt her kortini. Løgreglan kann jú ikki seta eina klokkutíð á, nær eitt innbrot ella okkurt annað brot á lóðina, verður framt.

Tú hevur jú tagnarskyldu, men sleppur tú at royna nógv, so tú ikki situr fyri einki?

Ja, alt møguligt. Eg eri altíð uppá fartin, eg havi ikki tíð at keða meg.

Eru tað ofta næmingar í starvsvenjing á Løgreglustøðini?

Ja, umleið 10 um árið, og næmingarnir eru einans úr 10 fl.

Hvussu leingi tekur tað at læra til løgreglumann/kvinnu?

Royndartíðin er 3 ár frá tí tú byrjar í skúlanum til tú hevur fast arbeiði.

Hvat krevst fyri at sleppa inn á skúlan?

Peran skal verða so at siga í lagi (verður rópt aftan fyri Tóru, frá onkrum løgreglumanni, og látur er at hoyra).

Hvussu nógvir løgreglumenn/kvinnur eru í Føroyum?

Runt allar Føroyar eru uml. 90-95 løgreglufólk.

Hvat fer tú at gera aftan á 10 fl.?

Eg havi søkt inn á málsligu deild á studentaskúlanum í Hoydølum. So er meiningin, um tað vil so verða, at fara niður at læra.

# Brúka forhøllina á Landssjúkrahúsinum at sova í

*Talið á teimum, sum ongastaðni hava at sova, er bara vaksandi í Havn, sigur Heðin Mortensen í viðmerkingunum til fyrispurning*

ÓLAVUR Í BEITI



– Hevur landsstýrismaðurin nakrar ætlanir um at bøta um bústaðarmøguleikarnar hjá teimum sosialt veikastu borgarunum? Kann landsstýrismaðurin vísandi til lóggávu siga, hvør hevur skyldu til og ábyrgd av, at eisini hesum borgarum verður tryggjað mannsømilig kor? spyr Heðin Mortensen, og at enda spyr hann, um landsstýrismaðurin heldur, tað vera rímiligt, at ein privatur felagsskapur sum t.d. Frelsunarherurin átekur sær hesa samfelagsligu uppgávu, uttan at fíggjarliga grundarlagið er tryggjað við lóggávu.

**Frelsunarherurin við**

Í viðmerkingunum til spurningarnar, sigur Heðin Mortensen, at serliga í Tórshavnar kommunu er tað ein trupulleiki við vaksandi talinum av borgarum, sum ikki sjálvir eru førir fyri at útvega sær bústað. Frelsunarherurin hevur gjørt og ger framvegis eitt stórt sosialt arbeiði. Í 1998 læt Frelsunarherurin í Tórshavn upp eitt herberg, har tey, ið ongastaðni høvdu at vera um náttina, fingu boðið eina song.

– Av ársfrágreiðingini fyri 1999 framgongur, at talið á teimum, ið gista á herberginum, er støðugt vaksandi, men samstundis verður víst á, hvussu hugstoytt og trupult tað er serliga køldu árstíðina at senda tey út aftur á gøtuna um dagin.

– Eisini fræðist, at fólk, sum ongan bústað hava, m. a. brúka forhøllina á Landssjúkrahúsinum til gisting, sigur Heðin Mortensen í viðmerkingunum til fyrispurning hann hevur sett Helenu Dam á Neystabø.


Føroya Handilsskúli søkir eftir

## LÆRARUM og TÍMALÆRARUM

frá 1. august 2000 ella eftir nærri avtalu. Hevur umsøkjari útbúgving í lærugreinum, sum nøkta tørv skúlans, kann talan verða um fast starv.

**Tórshavn**

FHS:
Virkisbúskapur á C-stigi (8 t/v), týskt á stigi E/C (7 t/v), fiskivinna (6 t/v), samfelagslæru (8 t/v), støddfrøði D/C (12 t/v), dekoratión (3-6 t/v) og føroyskt (12 t/v).

HH:
Marknaðaføring (4 t/v), støddfrøði (8 t/v), samtíðarsøga (8 t/v), uttanríkishandil (6 t/v), vinnulívsrættur (6 t/v), danskt (4 t/v), samfelagsbúskap (3 t/v) og týskt (8 t/v).

**Kambsdali**

Føroyskt stig C/A (24 tímar), danskt B (5 t.),enskt C/B/A (27 t.), info. C/B (10 t.), samfelagslæra C (12 t.), roknskaparlæra/virkisbúskapur B/A (9,5 t.), marknaðarførsla C/B/A (20 t.), týskt G/C/B (16,5 t.), støddfrøði G/C/B (12,5 t.), spanskt G/C (8 t.), G (3 t.), fyriskipan A (4 t.), sálarfrøði C (4 t.), samtíðarsøgu C (8 t.), samfelagslæru B (3 t.), uttanríkishandil V (3 t.), vinnulívs-rættur C (6 t.).
Hava tygum røttu útbúgvingina og røttu lærugreinasamanseting kann talan vera um fast starv.

**Førleikakrøv:**
Prógv frá handilsháskúla, lærdum háskúla, handilsfaklæraraprógv ella onnur við øðrum fortreytum. Umsøkjarar við vinnuroyndum hava fyrimun.

**Setanarkor til fast starv:**
Fyrstu 2 árini verða roknað sum royndartíð, har tann, sum verður settur í fast starv, má vera til reiðar skjótast gjørligt at taka ta eftirútbúgving - tað veri seg pedagogiska/undirvísingarliga ella aðra førleikagevandi útbúgving - sum er neyðug fyri at verða sett/-ur í fast starv. Eisini mugu viðkomandi rokna við í ávísan mun at skula undirvísa á fleiri stigum og partvís um kvøldið um neyðugt.

**Løn:**
Í lønarrensli 13/21/24, 18/26/29, 16/21/29/31 hjá HL ella eftir avtalu.

**Leyst at søkja:**
27. mars 2000. Galdandi til 11. apríl 2000.
Umsóknin skal sendast skúlanum, sum ætlanin er at starvast á.

**Umsókn fast starv:**
Umsókn við ljósprentum av próvskjølum o.ø., skulu stílast til Føroya Handilsskúla, stýrið og sendast antin til Føroya Handilsskúla í Tórshavn, Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177 ella Føroya Handilsskúla á Kambsdali 530 Fuglafjørður og verða skúlanum í hendi 11. apríl 2000.
Umsóknarblað fæst á skúlanum.

**Umsókn tímalærari:**
Umsókn við ljósprentum av próvskjølum o.ø., skulu stílast til Føroya Handilsskúla, stýrið og sendast antin til Føroya Handilsskúla í Tórshavn, Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177 ella Føroya Handilsskúla á Kambsdali 530 Fuglafjørður og verða skúlanum í hendi 11. apríl 2000.
Umsóknarblað fæst á skúlanum.

*Á Føroya Handilsskúla fevnir frálæran um FHS-støðisár, FHS 2.part, hægri handilsskúla, stakroyndir, merkonom, Datanom, teldustøðingaútbúgving, HD 1. part, peningastovnaskúli og útboðin/umbiðin skeið.*

FØROYA HANDILSSKÚLI